# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tórshavnar alfrøði:

## Konfirmantar í oktober 1908



Hesir vóru konfirmantarnir í Havnar kirkju 4. oktober 1908:
Hans Nicolaj Flemming Christiansen, David Einar Djurhuus, Emil Christian Martin Frits Rubeksen, Hans Pauli Hansen, Johannes Sofus Olsen, Thomas Edvard Frederik Joensen, Marie Arge, Anna Cathrine Elisabeth Arge, Alvilda Vægter, Johanne Petersen, Dania Einarsson, Billa Johanne Pouline Hansen og Frida Juline Udbø, (øll úr Havn), Andrea Marie Eide, Inga Susanne Magdalene Hansen, Hans Pauli Danielsen (øll úr Nólsoy), Johannes Theodor Jacobsen (Borðan), Kleafanie Svanhilda Dagmar Reinert (Norðradalur), Rachel Frederikke Marie Petersen (Kaldbak), og Marna Marie Hansen (Syðradalur). 20 vóru konfirmantarnir, meðan 19 eru á myndini.

Einastu konfirmantarnir vit kenna eru: Nr. 3 (standandi aftast) Andrea Marie Eide (Nólsoy), gentan (t.h. frá Mariu Eide) er Inga Susanne Magdalene Hansen (Nólsoy) og drongurin (beint aftan fyri Ingu) er Johannes Theodor Jacobsen á Borðuni.

Vónandi kunnu lesararnir hjálpa okkum við at fáa restina av nøvnunum upp á pláss. Vinarliga ringið til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647.

## Sóknast eftir konfirmantamynd frá 1933

Er tað nakar sum hevur myndina av konfirmantunum um heysti 1933?
Hesir vóru konfirmantarnir. Arnóra Evensen, Inge Lützen, Helga Julia Skarðhamar, Ása Valborg Christiansen, Anna Juline Thomassen, Turid Elisabeth Thomsen, Sofie Helene Egholm, Marta Olevine Julie Viðstein, Anna Fríðrika Rasmussen, Dagny Elise Hansen, Nancy Petersen, Ingolf Daniel Jacobsen, Meinert Sofus Andreasen, Joen Pauli Joensen, Poul Harry Rubeksen, Gunnar Waagstein, Johannes Joensen, Júst Djurhuus, Christian Ludvig Sigurd Samuelsen, Charlie Arnold Vilhelmsen Adelhardt Telling, Árni Finnur Árnason Helmsdal, Peter Hans Sørensen, Evald Sibil Arne Joensen (øll úr Havn), Johan Esberg Simonsen (Hoyvík), Regin Dahl (Sandagerði), Poul Frederik Poulsen, Jens Ferdinand Poulsen, Christen Severin Holm og Gudmundur Danielsen (øll Nólsoy), og Henni Oline Kristine Marie Simonsen (Norðradalur).

Um onkur hevur ella veit um onkran sum eigur myndina av hesi konfirmatiónini, verða tey biðin um at ringja til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647.

# Ískoyti til eftirløn

**Danska fakblaðið "Fagbladet 3F" hevur í fleiri greinum víst á, at nógvir pensionistar, sum fyrr hava arbeitt í øðrum Norðurlondum, ikki fáa ta pensión teir hava rætt til. Spurninurin er, um føroyingar eisini hava hendan rætt**

EFTIRLØN
*Lena R. Guttesen*
*Magnus Gunarsson*

Í 1946 gjørdu Danmark og Svøríki eina skiftisavtalu í samband við arbeiðsmegi í báðum londunum, og í 1954 samdust Danmark, Svøríki, Norra, Finland og Ísland um at seta á stovn ein opnan arbeiðsmarknað.

Sambært hesi avtalu hava pensionistar, sum fyrr hava starvast í øðrum Norðurlondum í trý ár, rætt til hesa eyka eftirløn. Tó gloyma, ella lata tey vera við at koma við upplýsingunum, tá tey søkja um fólkapensión.

Mánaðarligar upphæddir upp á 1.000 kr ella meira vera ikki útgoldnar tí at pensjónistarnir ikki hava upplýst, at teir hava arbeitt í einum øðrum Norðurlandi sum t.d. Svøríki ella Norra.

Í 1949 arbeiddu 18.000 danir í Svøríki, standur í 100 ára minnisritinum hjá LO. Í tíðarskeiðinum frá 1964 til 1980 fóru gott 25.000 danir av landinum til Svøríkis at arbeiða sambært donskum hagtølum. 5.200 danir fáa sum nú er eftirløn frá Svøríki, upplýsir ein stovnur undir danska heilsumálaráðnum. Óiva hava fleiri føroyingar verið við í hesum arbeiði uttanlands.

Í Danmark skulu umsóknirnar koma frá pensiónsskrivstovuni hjá lokalu kommunum og sendast til Den Sociale Sikringsstyrelse.

Í Fagbladet 3F er eitt dømi um 67 ára gamla Leif Jensen, sum býr norðan fyri Køge.

Umframt sína donsku efturløn fær hann umleið 400 krónur um mánaðin í svenskari efturløn. Hetta kemst av, at hann sum ungur starvaðist í Svøríki í 1950-inum.

Tá Leif Jensen í november 2004 fekk umsóknarblaðið til sína fólkapensión, helt hann tað ikki vera neyðugt at siga frá tíðarskeiðnum, tá hann sum ungur arbeiddi í Svøríki. Hann hevði jú rætt til fulla efturløn frá heimlandi sínum, og ivaðist hann tí í, um tað fór at fáa negativa ávirkan á hansara donsku pensión, um hann segði nakað um hetta tíðarskeið. Men tað gjørdi tað ikki.

Síðan 1. januar 2005 hevur Leif Jensen fingið mánaðarliga efturløn frá Svøríki, sum eitt ískoyti, afturat hansara donsku efturløn. Afturat tí kom við afturvirkandi kraft ein eingangsupphædd, roknað frá tí hann bleiv pensioneraður til 1. januar.

Áhugavert kundi verið at vita um føroyingar, sum hava arbeitt í øðrum Norðurlondum, hava somu rættindir. Nógvir føroyingar, sum nú eru pensioneraðir, arbeiddu í t.d. í Íslandi. Sum skilst verður fyrispurningur reistur í løgtinginum í hesum sambandi.

Á heimasíðuni www.dss.dk fæst meira at vita um hesar pensiónirnar.

## Dagurin í morgin

**7. desember. Agaton**, deyður ár 250. Rómverskur hermaður, sum var kristin og varð tikin av døgum, tá ið Decius var keisari. Grikska navnið merkir *góður*.

Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsanir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**

veitst tú ikki tað?
Sosialurin